## Streymurin harðnar

Seinastu dagarnar hevur verið rættiliga gott útróðrarveður, og so verður eisini eina stund aftrat. Á Sandoynni verður sagt frá, at fleiri línubátar hava roynt hesar dagarnar, skrivar heimasíðan bkv.fo. Streymtalvan sigur kortini, at streymurin tekur til í morgin og hósdagin. Fiskiskapurin hevur annar ligið um 100 pund uppá stampin. Myndin er av Fiskakletti, sum er ávegis til Skopunar úr Hesti.



# Gott at arbeiða á fla



**– Eg veit ikki rættiliga, hvat eg fari at gera, tá eg verði liðug við 10. flokk. Kanska fari eg at halda fram her á NORÐFRA, kanska finni eg uppá okkurt annað, sigur 16 ára gamli Justrid Joensen í Hvannasundi**

FLAKAKVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norðdepil:** - Mær dámar sera væl at arbeiða her, men um eg fortseti – tað fer tíðin at vísa, sigur hon við Sosialin.

Hósdagin í farnu viku vóru vit á vitjan á virkinum NORÐFRA í Norðdepli. Her var nakað av fólki til arbeiðis henda kalda januardagin.

Júst hesa løtuna vórðu tey órógvað av einum heldur sjáldsomum vetrargesti: Ein týskur ferðamaður var komin framvið við bili sínum fyri at keypa føroyskan fisk.

Hann skuldi til Danmarkar

*- Mær dámar væl at arbeiða her, sigur Justrid*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## FAKTA

**NORÐFRA**
NORÐFRA er veitari av fyrstafloks fiskavørum til føroysku heimini og til stórkøkar. Felagið NORÐFRA hevur egna framleiðslu á flakavirkinum við sama navni, og hevur heimstað í Norðdepli. NORÐFRA er eitt løggildað virki, sum umframt at selja fyrstafloks fiskavørur til føroyingar, eisini selur tær føroysku fiskavørurnar til keyparar í USA og á europeiska marknaðinum.